# HEILSANIR



**Til silvurbrúdleypsparið Hanne og Kristinn Nordendal**
Hjartaliga tillukku við silvurbrúdleypsdegnum. Takk fyri alt, tit eru fyri okkum.
**Synir tykkara, Sámuel, Simon og Stefan**



Hjartaliga takka vit øllum sum gleddu okkum á hjúnabandsdegnum 15. august 2003. Gleðilig jól og gott nýggjár.
**Ynskja Joan og Jógvan**



Av hjarta takka vit øllum tykkum, sum á einhvønn hátt vóru við til at gera okkum hjúnabandsdag okkara 12. juli 2003 ógloymandi. Samstundis ynskja vit øllum eini gleðilig jól og Guds ríki signing í komandi ári.
**Heilsan Anna-Maria og Herluf Gudmundsson**



Øllum tykkum sum gjørdu hjúnabandsdag okkara tann 30. aug. 2003 so minnisríkan og ógloymandi, vilja vit veita eina hjartans tøkk. Síðani vilja vit ynskja tykkum eisni gleðilig jól og eitt av Harranum signa nýggjár.
**Heilsan Lena og Hjalti Hvítklett**



Hjartaliga takka vit øllum, sum við gávum, telegrammum og hjáveru gjørdu okkum brúdleypsdagin 17. mai 2003 so sera hugnaligan og ógloymandi. Takk fyri hjálpina til øll tykkum, sum gjørdu veitsluna til nakað, vit minnast við stórari gleði. Gleðilig jól og eitt av Harranum signað nýggjár.
**Sofus og Sunneva**



Tøkk til øll tykkum, sum á ymiskan hátt gleddu okkum á hjúnabandsdegi okkara tann 29.mars 2003. Við ynskum um eini gleðilig jól og eitt av Harranum signað nýggjár.
**Kaja og Christian**




Hjartaliga takka vit øllum sum á ymiskan hátt vóru við til at gera okkum silvurbrúðleypsdagin 13. mai ógloymandi. Somuleiðis ynskja vit ætt, vinum og kenningum eini gleðilig jól og eitt av harranum signað nýggjar
**Sólfríð og Adolf Jacobsen**



Eg og foreldur míni takka hjartaliga øllum, ið gjørdu mær konfirmatiónsdagin 5. okt 2003 so hugnaligan. Tøkk til øll tykkum, ið hjálptu til. Gleðilig jól og eitt av Harranum vælsignað nýggjár.
**Dávid Reinert Petersen, Saltnes**



**Góða Birita**
Hjartaliga tillukku við 60 ára degnum.
**Heilsan frá okkum á Høgabø**



**Góði elskaði babba**
Eg og mamma ynskja tær hjartaliga tillukku við føðingardegnum jólaaftan.
**Bestu heilsanir Hans Jacob**



**Góða Ernst og Hans Jacob**
Hjartaliga tillukku við føðingardøgnunum jólaaftan. Vit ynskja tykkum eini gleðilig jól og Harrans signað nýggjár.
**Frá okkum á Klaksvíksvegi 53**



**Góða Sarita**
Hjartaliga tillukku við 14 ára føðingardegnum. Eisini ein heilsan til Káru.
**Bestu ynskir omma, abbi og Uni**



**Hey góða**
Hvør skuldi trúð, at tú verður 60 ár sunnudagin. Hjartaliga tillukku og alt tað besta í framtíðini. Jú, tú sær líka gott út enn.
**Ynskir myndatakarin**


## Heilsanir

30,- kr. Sosialurin

**5 ferðir um vikuna**

### Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑Leygard.

Tekstur:........................................................................
..................................................................................
..................................................................................
..................................................................................
..................................................................................
..................................................................................

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.
Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: ..........................................................................
Bústaður: ....................................................................
Bygd/býur: .................................... Tlf.: ................

Sendið lepan, mynd og gjald til:
Sosialurin
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: »**Heilsanir**«




# TILTØK

### Jólaaftan
*Havnar kirkja:* kl. 15 Sonja Klein
kl. 17 Bjarni Bæk
*Hvítanes:* kl. 17 Sonja Klein
*Vesturkirkjan:* kl. 13.30 Bergur D. Joensen, Donsk gudstænasta,
*kl. 15* Heri Joensen,
*kl. 17* Bergur D. Joensen
*Argja kirkja:* kl. 15 Bergur D. Joensen,
*kl. 17* Heri Joensen
*Norðradalur:* kl. 13.30 Heri Joensen
Kvívík: kl. 17 Marjun Bæk
*Vestmanna:* kl. 17 og 17.15 Inga Poulsen Dam
*Hósvík:* kl. 15.30,
*Hvalvík:* kl. 17 Mogens Tilsted Christensen
*Norðskála:* kl. 17 Emil Olsen
*Øravík:* kl. 15 Jónsvein Bech
*Vágur:* kl. 17 Patrick de Neergaard
*Húsavík:* kl. 16.30 Jákup R. Hansen
*Sandur:* kl. 18 Jákup R. Hansen

### Jóladagur
*Havnar kirkja:* kl. 11 Sonja Klein
*kl. 18* Hans J. Joensen, biskupur
*Kaldbak:* kl. 18 Bjarni Bæk
*Vesturkirkjan:* kl. 11 Sverri Steinhólm
*Argja kirkja:* kl. 11 Bergur D. Joensen
*Kirkjubøur:* kl. 12 Heri Joensen. Talvan gongur fyri kirkjuna
*Kollafjørður:* kl. 12,
*Hvalvík:* kl. 17,
*Tjørnuvík:* kl. 19 Marjun Bæk
*Miðvágur:* kl. 12,
*Vestmanna:* kl. 17,
*Hósvík:* kl. 18.30 Inga Poulsen Dam
*Kvívík:* kl. 12,Langasandur: kl. 15,
*Haldarsvík:* kl. 16.30 Mogens Tilsted Christensen
*Eiði:* kl. 11.40 skriftamál, kl. 12 Messa Emil Olsen
*Fámjin:* kl. 12 Jónsvein Bech
*Tvøroyri:* kl. 18 Jónsvein Bech. (Í Fámjin og á Tvøroyri gongur talvan fyri Neyðhjálp Fólkakirkjunnar)
*Vágur:* kl. 11 v/ dópi,
*Sumba:* kl. 17,
*Porkeri:* kl. 19 Patrick de Neergaard
*Hvalba:* kl. 12.30 Ólavur Rasmussen
*Sandvík:* kl. 15 Ólavur Rasmussen
*Hov:* kl. 17 Ólavur Rasmussen
Skálavík: kl. 12 Jákup R. Hansen
Skopun: kl. 18 Børn syngja: Jákup R. Hansen

### 2. jóladagur
*Havnar kirkja:* kl. 11 Bjarni Bæk
*Nólsoy:* kl. 12 Sonja Klein
*Vesturkirkjan:* kl. 11 Heri Joensen
*Hestur:* kl. 12 Bergur D. Joensen
*Norðskála:* kl. 11.40 skriftamál, kl. 12 messa (talvan gongur fyri sunnudagsskúlan á staðnum) Emil Olsen
*Haldarsvík:* kl. 12, Marjun Bæk
*Tjørnuvík:* kl. 12 Mogens Tilsted Christensen
*Fámjin:* kl. 12 Ólavur Rasmussen
Dalur: kl. 12, altarg., Jákup R. Hansen

### Sunnudagin 28. des.
*Vesturkirkjan:* kl. 11 Heri Joensen
*Havnar kirkja:* kl. 11 Sonja Klein
*Nólsoy:* kl. 12 Bjarni Bæk, altarg.
*Hósvík:* kl. 12 Emil Olsen
*Kvívík:* kl. 12 Marjun Bæk
*Saksun:* kl. 11 Mogens Tilsted Christensen
*Tvøroyri:* kl. 11 Jónsvein Bech
*Vágur:* kl. 11 v/ dópi, Patrick de Neergaard
*Sandur:* kl. 12 Jákup R. Hansen

### Hebron, Argir
Um jólahøgtíðina verða eingi møti.
Sunnudagin 28. des. kl. 10.30 Morgunmøti og samstundis verður barnaansing. Á møtinum talar Súni S. Jacobsen. Sunnudagin verður eingin sunnudagsskúli. Sunnudagsskúlin byrjar aftur 11. januar 2004. www.hebron.fo

### Adventkirkjan
Mikudagin, jólaaftan kl. 16 Gudstænasta.
Leygardagin kl. 10 Barnabíbliutími og bíbliugransking. Evnið: Ein mynd av Gudi, kl. 11 Gudstænasta, Harri Gudmundsson. Eingin kvøldmáltíð.
Sunnukvøldið kl. 19 nýggjársveitsla.

### Frelsunarherurin, Tórshavn
Jólaaftan kl. 17 Jólagudstænasta.
1. jóladag kl. 11 Hátíðarmøti.
2. jóladag kl. 16 Familju jólaveitsla.
Sunnudagin 28. des. kl. 17 Almenn jólaveitsla fyri eldri. Herbergið hevur døgnopið alla hátíðina. Gleðilig jól øll somul.

### Katólska kirkjan
Jólaaftan kl. 11.30 Messa í Kerit. Jólanátt kl. 00.00 Miðnáttarmessa í kirkjuni.
1. jóladag kl. 11 Hámessa v/ Pater Lars Messerschmidt í Mariukirkjuni
2. jóladag kl. 11 Messa í kirkjuni
Leygardagin 27. kl. 11.30 Messa í Kerit. kl. 14.30 Jólaveitsla fyri børnini.
Sunnudagin 28. kl. 11 Hámessa og barnadópur v/ Pater Lars Messerschmidt í Mariukirkjuni. Aftaná verður kirkjukaffi. Eingin sunnudagsskúli. kl. 15-18 síðsta sunnudag í hvørjum mánaði verður tilbiðjan av tí Heilaga Sakramentinum í Mariukirkjuni

### Ebenezer
Jólaaftan kl. 15 Barnamøti.
Jóladag kl. 18 Útisetamøti.
2. jóladag kl. 18 Sjómansmøti.
Sunnukvøldið kl. 18 Nýggjársveitsla
Mánadagin kl. 15 Barnaveitsla fyri 7 ár og yngri. Kl. 18 Barnaveitsla fyri 8 ár og eldri.
www.ebenezer.fo

### Meinigheitin í Hoyvík
*uppi á Brekku 3*
Jólaaftan gudstænasta kl. 15.
2. jóladag kl. 11 Gudstænasta.
Sunnudagin kl. 18 Møti v/ Tóra Slættalíð.
Nýggjársdag 1. januar Gudstænasta kl. 11.

### Meinigheitshúsið
2. jóladag kl. 18 Møti v/ Thomas Thomasen.
Sunnudagin 28. kl. 18 Møti v/ Aksel Jacobsen.
Leygardagin 3. jan. kl. 16.30 Bønarløta – kvinnur.
Sunnudagin 4. jan. kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 byrjar Heimsbønarvikan við møti v/ Johannes Mortensen.

### KFUM og KFUK í Havn
Mánadagin 29. des. kl. 19.30 í KFUK: Jólafest fyri vaksin. Inngangur við Hjørleif Poulsen, lærara úr Klaksvík. Týsdagin 30. des. kl. 17 í KFUK: Jólafest fyri várgleði, títtlingar og onnur.

### Tórshavnar Hvítusunnusamkoma
*Yviri við Strond*
Sunnukvøldið einki møti.
4. januar aftur sum vant.

### Miðvágs missiónshús
Jólafestin verður sunnudagin 28. des. kl. 18. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Missiónshúsið í Hvalvík
Jólafest fyri børn verður 2. jóladag kl. 16. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Keldan, Skálafirði
Sunnudagin kl. 18 Nýggjársfest fyri vaksin (Tekningarlisti).

### Missións- og Ungdómshúsið á Glyvrum
2. jóladag kl. 18 Møti.
Sunnudagin 28. kl. 18 Jólaveitsla fyri vaksin. Eingin sunnudagsskúli.
Nýggjársdag kl. 18 Møti.
Eingin sunnudagsskúli. Øll eru hjartaliga vælkomin.
www.jesus.fo

### Thabor, Fuglafjørður
Jólatræ fyri børn verður sunnudagin 28. desember. Kl. 16 fyri børn undir skúlaaldri og kl. 19 fyri børn í skúlaaldri.
Jólaveitslan fyri vaksin verður mánadagin 29. des. kl. 19.

### Missiónshúsið, Leirvík
Jólafestin 27. des. kl. 19.00. 28. desember kl. 16 Jólatræ fyri yngri børn og kl. 19 eldri.

### Sandoy
Leygarkvøldið 27. des. kl. 20 verður Evangel. fundur í Samljóð í Skopun.
Sunnukvøldið 28. kl. 20 Evangel. fundur í Sólarris í Húsavík.
Mánakvøldið 29. des. kl. 17 Evangel. fundur í Virkinum á Sandi, kl. 20 Fundur í Kelduni í Skálavík.
Týskvøldið 30. des. kl. 20 verður Evangel. fundur í Eiriksgarði í Dali. Talarar: Levi Joensen o.a. Eftir fundirnar bjóða vit kaffi og børnini fáa pakka. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Missiónshúsið í Skopun
2. jóladag kl. 18 Møti.
Jólafestin fyri børnini verður sunnudagin 28. des. Børn undir skúlaaldur kl. 16. Børn í skúlaaldri kl. 19. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### KFUM & K, Klaksvík
Jóladag kl. 17.30 Bønarmøti, kl. 18 Møti við Óla Poulsen.
2. jóladag kl. 17.30 Bønarmøti, kl. 18 Møti við Hanus Simonsen, kl. 21 Ungdómsmøti við »Útisetum«.
Leygardagin kl. 16 Jólaveitslur fyri børn undir skúlaaldur, kl. 19 Jólaveitslur fyri børn í skúlaaldri.
Sunnudagin 28. Ongin sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bønarmøti, kl. 18 Møti.
1. januar kl. 18 Nýggjársveitsla. www.kuff.fo

### Missiónshúsið á Tvøroyri
Sunnukvøldið 28. des. kl. 19 Jóla- og sjómansveitsla. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Betel, Vágur
Mánadagin kl. 20 Bønar- og uppbyggingarfundur.
1. joladag kl. 18 Evangeliskur fundur.
2. jóladag kl. 18 Evangeliskur fundur.
Sunnudagin kl. 11 Breyðbróting, kl. 18 Evangel. fundur.
Mánadagin kl. 16 Nýggjársveitsla fyri børn.

### Missiónshúsið í Porkeri
Barnafestin verður leygardagin 27. des. kl. 17. Jóla- og sjómannafestin verður sunnudagin 28. des. kl. 18. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Felagið Tórshavn
Týsdagin 30. desember kl. 19.30 verður vitja í Ebenezer. Tilmelding.

### Tilhaldið
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
**Tilhaldið er stongt frá 23. desember til 5. januar 2004.** Vit ynskja øllum eini góð og hugnalig jól og takka fyri tað skjótt farna.

*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

### Fløvi – dagtilhaldið fyri pensiónistar
*í kvinnufelagshúsinum á Glyvrum – allir pensionistar hjartaliga vælkomnir. Opið mánadag-fríggjadag kl. 15-18.*
**Jólafrí til 5. januar 2004.**
Vit í Fløvanum ynskja øllum eini gleðilig jól og eitt av Harranum vælsignað nýggjár, við tøkk fyri tað farna.

*Eins og vanligt er, verður byrjað við einum Guðs orði, og framvegis eru luttakararnir vælkomnir at taka eitt og hvørt ítriv við sær, eitt nú stokkar o.a. Bløðini eru til taks í Fløvanum. Serflutningstænastan v/ Andreas Poulsen er byrjað. Hava tygum tørv á koyring, ringið vinarligast tlf. 448051.*

### Tilhaldið Hugnin í Sandoynni
Tilhaldið í Sandoynni er opið mánadag og mikudag frá kl. 14-17. Báðar dagarnar er drekkamuður at fáa.
Mikudagurin 17. des. er seinasta dagur Tilhaldið er opið undan jólum. Vit hittast aftur mánadagin 5. jan. í komandi ári. Gleðilig jól og eitt gott komandi ár.

### Dagtilhaldið í Vági
er hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15 til 18. Øll eru vælkomin.

### Spælistovan í meinigheitshúsinum
er opin mána-, miku- og hósdag kl. 9-12 fyri foreldur við børnum, sum ikki hava ansing.

## 80 ÁR

Mánadagin 29. desember fylla tvíburarnir, Vina Mørk og Sanna Poulsen, ættaðar úr Nólsoy, 80 ár. Dagurin verður hildin við familjum á Hotel Føroyum sunnudagin, 28. desember. Tey, ið ynskja at hitta føðingardagsbørnini, eru vælkomin til ein drekkamun á Hotel Føroyum sunnudagin millum 16 og 18.

Sunnudagin 4. januar 2004 fyllir Jona Henriksen, fyrrverandi KFUK-skrivari 80 ár. Dagurin verður hildin í KFUK frá kl. 15-18.

## BRÚDLEYP

27. desember giftast Britt Kirke Petersen, Vágur og Andrass Djurhuus, Porkeri. Vígslan sum skuldi vera í Porkeris skúla, er flutt í salin Betania kl. 14.00. Veitslan verður fyri innbodnum á Hotel Øravík.

Leygardagin 27. desember giftast Salmina Arnoldson og Teitur Poulsen. Vígslan verður í Havnar kirkju kl. 16.00. Veitslan fyri innbodnum verður á Hotel Føroyum kl. 19.00.

Sunnudagin 28. desember giftast Súsanna M. Ø. Vang og Jan Møller í Kildebrønde Kirke. Brúdleypið verður hildið fyri innbodnum í Restaurant Karlslunde Strand, Karlslunde Strandvej 87, 2690 Karlslunde.

## SILVURBRÚDLEYP

Sunnudagin 28. desember hava hjúnini Alice og Ólavur Heinesen, Leirvík, silvurbrúdleyp. Opið hús verður heima frá kl. 19.00, har øll eru hjartaliga vælkomin.

Mánadagin 29. desember hava Anna Maria og Leivur Hansen, Hoyvík, verið gift í 25 ár. Opið hús verður í heiminum, Lýðarsvegi 21, kl. 11-14. Týskvøldið 30. desember kl. 19 verður veitsla fyri innbodnum í HB-húsinum.

## GULLBRÚDLEYP

Leygardagin 27. desember 2003 hava hjúnini Poul E. Poulsen og Kristina Poulsen, Hvalba verið gift í 50 ár. Dagurin veðrur hildin saman við børnunum.

29. desember hava Poula og Magnus Ennistíg, Klaksvík, verið gift í 50 ár. Dagurin verður hildin heima, saman við familjuni.

Týsdagin 30. desember kunnu hjúnini Anna Helena og Jóan Jakku Mortensen, Tórshavn halda gullbrúdleyp. Høvi verður at heilsa uppá tey frá kl. 11.00 til 16.00 á Lýðarsvegi 15 í Hoyvík. Døgurði fyri innbodnum verður um kvøldið.

Mikudagin 31. desember hava hjúnini Hanna og Sigurd á Brúgv Johannesen, Vestmanna, gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin í bygdarhúsinum. Tey, ið vilja heilsa uppá gullbrúðarparið eru hjartaliga vælkomin frá kl. 17.00.

Nýggjársaftan hava hjúnini Hanna og Karl Isaksen í Klaksvík verið gift í 50 ár. Dagurin verður hildin hjá dóttrini á Traðargøtu 13 frá kl. 16.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

## DIAMANTBRÚDLEYP

Leygardagin 27. desember hava Kitty og Pollaba Poulsen, Klaksvík, verið gift í 60 ár. Dagurin verður hildin heima frá kl. 15.00.

Leygardagin 27. desember hava Jancy og Jákup Biskopstø, Klaksvík, diamantbrúdleyp. Dagurin verður hildin saman við børnunum.